# Roynd við skiljirist
# Magnus Heinason - Túrur 1614
**21. apríl – 25. apríl - 2016**

**Fólk við frá HAV:** Poul Vestergaard og Mourits Mohr Joensen
**Fólk við frá trolvirkinum Vónin:** Óli Horn

**Endamál:** Høvuðsendamálið við royndini var at kanna, hvussu væl ristin skilir tosk, hýsu og upsa. Tó varð øll veiðan kanna, so til ber at samanlíkna alla veiðuna.

**Reiðskapur:** Stjørnutrol 470♯ við 135 mm posa, rockhopper grunnur, 60 m breitlar og Sea-Hunter semi-pelagiskar 7 m² trolhurðar frá ROCK í Vági.
Ristin varð sett í eina sonevnda ristsektión, ið varð sett millum millumstykkið og bellin. Støddin á ristini var 1,75 m hædd x 1,24 m breidd, vinkulin 60º. 55 mm vóru millum rimarnar.
Streymmátarar at máta hvussu streymgongdin er gjøgnum trolið.
Filmstól til at filma innan í trolinum. Eisini høvdu vit ein "Flyara" við.

**Um túrin:**
Fóru av Havnini 21. apríl kl. 22.00.
Vit høvdu 28 hál, harav tey fysrtu 15 tóvini vóru norðanfyri, frá Viðoynni og eystur um Fugloynna, hetta fyri at fáa blanding av tosk og hýsu.
7 hál vóru tikin djúpari, norður úr Mýlingi, fyri at fáa upsa. Veðrið bleiv í so vánaligt, so vit fingu ikki roynt meira har.
Fóru suður um Fugloynna, har vit høvdu 6 tóv.

Til seinast gjørdu vit tvey tóv við einum "Flyara", sum er nakað nýtt, ið Vónin hevur ment, og sum er í staðin fyri kúlur. Hesin sonevndi "Flyari" varð settur á høvuðlínuna, fyri at fáa stabilari og hægri uppdrift á høvuðlínuna. Tað vísti seg at hæddin vaks við 40 cm á høvuðlínuni, og skverið helt somu breidd, sum við kúlum.
Tað vórðu 7 kúlur tiknar av mitt fyri á høvuðlínuni, har "flyarin" varð settur ístaðin.
Hæddin á trolinum hevur ligið um 6,1 m við kúlum, og skverið hevur ligið um 85 m við 60 m breitlum + forleingilsi, sum er góðar 12 m.
Við "Flyaranum" var trolið stabilt, hæddin var 6,5 m, og skverið 85 m.

Óli Horn frá trolvirkinum Vónini tók sær av streymmátingum og filmingini inni í trolinum, og varð hetta gjørt á so at siga øllum tóvum. Eisini tóvini við "Flyaranum".

Streymmátingarnar síggja út til at rigga væl, og væl av filmsupptøkum eru komnar í skjáttuna.

Fyribils sær út til, at ristin skilir væl. Tað var meira av smári hýsu og smáum upsa í trolinum við ongari rist, í mun til trolið við rist.
Endalig frágreiðing verður ætlandi liðug 01. oktober 2016.

Vóru aftur á Havnini 25. apríl kl. 17:00.

**Prøvatøka:** Veiðan varð øll longdarmátað og vigað. Íalt vórðu 28 tóv, og av teimum vórðu 26 uppgjørd. Øll fiskasløg vórðu mátað og vigað.

Fari at takka Óla Horn og Jógvan P. Olsen frá trolvirkinum Vónini fyri gott samstarv.

Mourits Mohr Joensen